# Sáttmáli

**millum**

**Føroya Handverkarafelag/**
**Landsfelag Handverkaranna**

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**2023 – 2025**

**Innihaldsyvirlit**

§ 1. Sáttmálaøki........3
§ 2. Setanarbræv........3
§ 3. Løn........3
§3a Starvsmetingarnevnd........4
§ 4. Starvsaldur........4
§ 5. Viðbøtur........5
§ 6. Yvirtíðarløn........5
§ 7. Arbeiði skipað í vaktum........5
§ 7 a. Arbeiði í ólagaligum tíðarskeiðum........6
§ 7 b. Tilkallivakt........6
§ 7c. Vaktarskylda........6
§ 7 d. Sjálvboðið eykaarbeiði........7
§ 8. Eftirlønargjald........7
§ 9. Fyribils tænasta í hægri starvi........7
§ 10. Eftirútbúgving, skeið o.a.........7
§ 11. Avspákan........7
§ 12. Tænastuferðir........7
§ 13. Ferðing í arbeiðsørindum........7
§ 14. Flytisamsýning........8
§ 15. Arbeiðsklæði........8
§ 16. Fastir frídagar........8
§ 17. Frítíðarreglur........8
§ 18. Farloyvi v.m.........8
§ 19. Barnsferð........8
§ 20. Reglur fyri uppsøgn, sjúkraløn v.m.........9
§ 21. Álitisfólk........9
§ 22 Frí við ongari løn........10
§ 23. Seravtalur........10
§ 24. Seravtalur fyri handverkarar/montørar í starvi hjá SEV........10
§ 25. Serstøk eykagjøld á SEV........10
§ 25. Serstøk eykagjøld á SEV........10
§ 26. Gerðarrættur........11
§ 27. Gildi sáttmálans........11
Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á kommunala sáttmálaøkinum........12
Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á kommunalum arbeiðsplássum........14

**§ 1. Sáttmálaøki**
*Stk. 1* Hesin sáttmáli fevnir um fastløntar handverkarar, húsavørðar, hallarvørðar, skúlatænarar og umsjónarmenn, sum starvast á arbeiðsplássum, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur málsræði til at áseta lønar- og setanarviðurskiftini. Sáttmálin er eisini galdandi fyri montørar í starvi hjá SEV við sveinabrævi sum elektrikari og við øðrum sveinabrævi, sum verður mett at geva fullgóða eltekniska vitan, t.d. radiomekanikarar.

*Stk. 2.* Handverkarar eftir stk. 1, sum hava arbeitt hjá SEV minsta lagi í eitt ½ ár og verða mettir egnaðir, kunnu verða útnevndir linjumenn/montørar. SEV kann í ávísum førum víkja frá hesi áseting.

*Stk. 3.* Handverkarar í starvi hjá SEV við øðrum sveinabrævi, enn tey í stk. 1 tilskilaðu t.d. við handverksútbúgving innan bygging ella jarnsmíð, kunnu verða útnevndir linjumenn/montørar eftir hesum sáttmála aftan á í minsta lagi 3 ára arbeiði hjá SEV.
Tá umstøðurnar tala fyri tí, kann útnevningin gerast eftir styttri enn 3 ára arbeiði.

*Stk. 4.* Handverkarar í starvi hjá SEV, sum eru ikki montørar/linjumenn vera løntir við galdandi tímaløn eftir sáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag. Nevndu handverkarar koma í fastlønarskipan, tá innihaldið í starvinum so sum krøv til fakliga vitan sjálvstøðugt arbeiði og ábyrgd, harundir leiðsluábyrgd í ávísan mun, talar fyri tí.

*Stk. 5.* Tá ið starv er leyst, verður tað alment lýst leyst at søkja. Um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir, tá er ikki neyðugt at starvið verður lýst leyst alment.

**§ 2. Setanarbræv**
*Stk. 1.* Mánaðarlønt og tey, sum eru sett í tíðaravmarkað starv út yvir 3 mánaðir, fáa í seinasta lagi 14 dagar eftir setan setanarbræv, og í tí skal standa:

- navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta
- nær setanin tekur við
- galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir
- starvsheiti
- byrjunarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti)
- eftirlønargjald
- starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri
- uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta
- setanarbrotpartur, arbeiðstíð
- frítíð við løn og frítíðarískoyti
- setanarøki og arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri støð, skal verða viðmerkt, hvar tann setti hevur høvuðsstarv).

**§ 3. Løn**
*Stk. 1.* Handverkarar verða løntir eftir lønartalvum galdandi fyri henda sáttmála.
*Stk. 2.* Tann í stk. 1 ásetta løn er treytað av fullum dagsarbeiði, sum vanliga telur 39,5 tímar um vikuna íroknað ½ tíma mattíð um dagin. Full arbeiðstíð hjá montørum/leiðandi montørum í starvi hjá SEV telur 40 tíma viku. Mattíðin verður løgd í samráð við Rakstrarleiðaran, alt eftir um arbeitt verður heima ella burturi.

Fyri at verða útnevndur leiðandi montørur skal viðkomandi hava leiðsluábyrgd av minst einum persóni.

Arbeiðstíðin hjá handverkarum og montørum eigur, har tað letur seg gera, at verða løgd soleiðis, at leygardagur verður frídagur.

*Stk. 3.* Fyri handverkarar við niðursettari arbeiðstíð verður lønin roknað lutfalsliga eftir tímatalinum.

*Stk. 4.* Fyri lakkeringsarbeiði verður roknað 1½ tíma eyka um tíman.

*Stk. 5.* Handverkari, sum er leiðari hjá øðrum handverkarum, verður løntur við einari løn, sum svarar til 6 eyka lønarstig í lønartalvuni, sí hesa.

Leiðandi handverkari 2 (formaður) ganga stigini 19, 20 og 21.
Viðmerking: einstaki arbeiðsgevarin avgerð í samráð við KAF, hvørt talan er um leiðandi handverkara ella leiðandi handverkara 2.
Tá ið metingin verður gjørd verður dentur dagdur á ábyrgdarøki, vav og slag av arbeiðsleiðslu.

*Stk. 6.* Arbeiðsgevarin kann, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi, við handverkara avtala eina serliga, persónliga flokking í eitt ávíst lønarstig.

*Stk. 7.* Lærlingar verða 1., 2., 3. og 4. læruárið løntir við ávikavist 40, 50, 60 og 70 % av byrjanarlønini fyri útlærd. Er lærutíðin styttri enn 4 ár, verða seinastu lønarstigini nýtt, soleiðis at seinasta heila læruár verður lønt eftir 4. lønarstigi (70 %). Er lærutíðin longri enn 4 ár, verður lønin eftir 4. læruár 80 % av lønini fyri útlærd.

S*tk. 8*. Tá ið lærlingurin fer í skúla um dagin, verður givið honum frítt at fara í arbeiðstíðini, uttan at tíðin verður frádrigin í løn hansara. Verður skúlagongdin uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, skal hetta gevast aftur í vanligum tímatali. Fer skúlagongdin fram frídagar ella leygardagar, skal lærlingurin hava samsvarandi frítíð onkran av yrkadøgunum.

*Stk. 9* Hava lærlingar undantaksvís yvirarbeiði, fáa teir yvirtíðarløn á 1. stigi í lønarflokkinum, teir koma í, tá ið teir eru útlærdir.

**§3a Starvsmetingarnevnd**
*Stk. 1.* Partarnir eru samdir um at seta eina starvsmetingarnevnd, við tveimum umboðum fyri hvønn partin, soleiðis at Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna hava hvør sítt umboð. Uppgávan hjá nevndini er at útbyggja og eftirmeta lønarskipanina, umframt at viðgera øll flokkingarmál, ið verða reist av antin Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ella Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.

**§ 4. Starvsaldur**
*Stk. 1.* Lønaraldurin verður roknaður frá tí, viðkomandi hevur fingið lærubræv/sveinabræv, um so er, at viðkomandi síðani lokna læru hevur arbeitt innan handverkarayrkið. Lønaraldur verður rundaður uppeftir til heilan mánað. Starvsfólk eru 1 ár á hvørjum lønarstigi.

*Stk. 2.* Er talan um arbeiðstíð minni enn hálva tíð verður lønaraldurin roknaður lutfalsliga. Aðrar arbeiðstíðir roknast at geva fullan lønaraldur.

*Stk. 3.* Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið kunnu koma ásamt um hægri lønaraldur enn tann í stk. 1 umrødda, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi.

**§ 5. Viðbøtur**
*Stk. 1.* Um so er, at starvið arbeiðsliga, frøðiliga, umsitingarliga, fyrisitingarliga, ábyrgdarliga ella á annan hátt hevur eina tilíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytunum fyri ásettu lønunum o.a., verður seravtala gjørd millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og felagið um viðbøtur og onnur viðurskifti. Um so er, at starvsviðurskiftini, sum eitt nú sjálvstøðugt arbeiði ella ábyrgd av fólki í vardum starvi, tala fyri, kann verða veitt handverkara ein viðbót afturat tí í § 3 nevndu løn.
Viðbøtur og møguligar aðrar sømdir verða veittar eftir avtalu ímillum Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

*Stk. 2.* Handverkari, sum leggur lík í kistu, fær í samsýning roknaðar 3 vanligar tímar eyka.

**§ 6. Yvirtíðarløn**
*Stk. 1.* Yvirtíðararbeiði eigur helst ikki at vera.

*Stk. 2.* Fyri álagt yvirtíðararbeiði verður goldin yvirtíðarløn afturat vanligu dagligu tímalønini soleiðis: Fyri 1., 2. og 3. tíman verður goldið 50%. Fyri 4. og fylgjandi yvirtímar og fyri arbeiði leygardagar, sunnudagar og fyri teir í § 16 nevndu frídagar 100%.
Yvirtíðargjald verður latið fyri hvønn ½ byrjaða tíma.

*Stk. 3.* Um tað er gjørligt, eigur at verða sagt frá yvirtíðararbeiði dagin fyri.

*Stk. 4.* Tímalønin er bruttoárslønin býtt við 2080. Bruttoárslønin er grundløn + viðbøtur.

*Stk. 5* Minstagjald fyri tilkalling uttan fyri vanliga arbeiðstíð er 2 tímar

*Stk. 6.* Fyri yvirtíðararbeiði, ið fer út um 2 tímar, eiga starvsfólk rætt til ½ tíma mattíð uttan frádrátt.

*Stk. 7.* Tá yvirtíðararbeiði endar og tað eru færri enn 6 tímar til byrjað verður aftur at arbeiða, verður ikki farið niður í løn.
*Galdandi frá 1. februar 2024*

*Stk. 8.* Handverkari við niðursettari arbeiðstíð fær bara yvirtíðargjald fyri álagt arbeiði aftaná vanligu arbeiðstíðina hjá viðkomandi arbeiðsgevara.

**§ 7. Arbeiði skipað í vaktum**
*Stk. 1.* Handverkarar, ið hava skiftandi arbeiðstíðir, skulu hava vaktarlista, sum fevnir um eitt ávíst tíðarskeið, við ásetingum um, nær arbeiðið skal gerast, og nær frídagarnir liggja. Arbeiðstíðin í miðal uppgjørd yvir eitt tílíkt tíðarskeið skal verða 39,5 tímar um vikuna. Handverkarar eiga 3 vikur fram at vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri avloysarar og tímalønt.

*Stk. 2.* Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, fær handverkari samsýning fyri 1 tíma eyka. Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, ið fellur uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, men er ikki at rokna sum yvirtíð.

*Stk. 3.* Ein sundurbýtt vakt má ikki strekkja seg yvir meira enn 12 tímar, uttan at handverkararnir eru samdir í hesum, og tá verður goldið hálvt vaktargjald I eyka um tíman.

*Stk. 4.* Fyri arbeiði á teimum í § 16 ásettu frídøgunum verður latið vaktargjald 2.

*Stk. 5.* Fellur ein frídagur eftir § 16 á ein dag, sum er frídagur eftir vaktlista, verður annar frídagur latin í staðin.

**§ 7 a. Arbeiði í ólagaligum tíðarskeiðum**
*Stk. 1.* Fyri arbeiði millum kl. 17.00 og 07.00 verður latið vaktargjald 1. Fyri arbeiði um vikuskiftið verður latið vaktargjald 2.Vikuskiftið byrjar kl. 17.00 fríggjakvøld og gongur fram til á midnátt sunnukvøld.

*Stk. 2.* Nevndu vaktargjøld verða ikki veitt saman við yvirtíðargjaldi.

*Stk. 3* Hesi gjøld verða roknaði fyri byrjaðar hálvar tímar.

**§ 7 b. Tilkallivakt**
*Stk. 1.* Fyri tilkallivakt verður latið vaktargjald 1 um tíman. Fyri vikuskiftistilkallivakt verður latið vaktargjald 2 um tíman. Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí, at tilkallivaktin tekur við til hon endar.

*Stk. 2.* Fyri tilkallivakt á teimum í § 16 nevndu frídøgum verður latið vaktargjald 2 um tíman. Fyri tilkallivakt halgi- og frídagar sambært § 16, sunnudagar undantiknir, verður veittur 1 frídagur.

*Stk. 3.* Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt yvirtíðargjald sambært § 6.

*Stk. 4.* Vaktargjald og yvirtíðargjald kunnu ikki latast fyri somu tímar.

*Stk. 5.* Tá tilkallivakt er av slíkum slag, at tað er rímiligt, at víkja frá omanfyristandandi, eitt nú lítið tyngjandi tilkallivaktir, verður samsýningin avtalað serstakt millum sáttmálapartarnar.

**§ 7c. Vaktarskylda**
*Stk. 1.* Henda grein er um eitt nú húsavørðar. Tá ið handverkari verður settur í starv, sum fevnir um ávísa vaktarskyldu ella ávísa telefonvakt og ber í sær aðrar vansar, skal avtala verða gjørd um, hvørja samsýning, handverkarin skal hava. Samsýningin kann vera veitt sum løn ella sum avspákan. Tá ið mett verður um samsýningina, verður tikið við alt tað, sum hevur týdning, so sum, hvat verður kravt av handverkaranum, hvussu ofta nakað kemur fyri, og tradisjónirnar í fakinum.

*Stk. 2.* Hevur ein handverkari skyldu at ansa flagginum, verður virðið av tí sett at vera 1.000 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan. Eru fløggini 4 ella fleiri, er samsýningin 1.500 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan.

Handverkari, ið hevur skyldu at ansa flaggi á Ellis- og røktarheimi fær samsýning á 1.500 kr. um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan.
Avtalur um viðbøtur verða at senda Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum til góðkenningar.

**§ 7 d. Sjálvboðið eykaarbeiði**
*Stk. 1.* Eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við sjúku ella feriu, og tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin kann tó ongantíð vera hægri enn yvirtíðarlønin. Slíkar avtalur skulu leggjast fyri álitisfólkið at góðkenna.

**§ 8. Eftirlønargjald**
*Stk. 1.* Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjald av grundlønini eftir lønartalvu galdandi fyri henda sáttmála, og av persónligum viðbótum sambært §§ 5 og 7 og § 7a. Eftirlønin verður at flyta í góðkenda eftirlønarskipan sambært eftirlønarlógini.
*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin flytur eftirlønargjaldið, sum er 15,0 %

**§ 9. Fyribils tænasta í hægri starvi**
*Stk. 1.* Handverkari, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi við arbeiðsgevarans góðkenning fyribils røkir hægri starv í meira enn 7 arbeiðsdagar samfelt, eigur í hesum tíðarskeiði at vera løntur við somu løn, sum hann hevði fingið, um hann varð settur í starvið, treytað av, at hann yvirtekur tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

*Stk. 2.* Er fyribilssetan í hægri starv einans grundað á fráveru vegna frítíð, tá hevur starvsfólkið rætt til hægri løn, tá tað hevur røkt fyribilssetan í hægri starvi í 21 dagar samanhangandi.

**§ 10. Eftirútbúgving, skeið o.a.**
*Stk. 1.* Tá handverkarar luttaka ein heilan dag í skeiðvirksemi, sum er fyriskipað av arbeiðsgevaranum, verður hvør skeiðsdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeiðsdagurin er longri enn 8 tímar, verður avroknað tíma fyri tíma, antin sum tímaløn ella avspáking.

**§ 11. Avspákan**
*Stk. 1* Álagt yvirtíðararbeiði kann verða avspákað, og verður avspákingin tá longd við teimum í § 6 nevndu yvirtíðarsatsum.

**§ 12. Tænastuferðir**
*Stk. 1.* Dag- og tímapeningur á tænastuferð og útiviðbót er hin sama sum fyri tænastumenn landsins.

**§ 13. Ferðing í arbeiðsørindum**
*Stk. 1.* Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstað er at rokna sum arbeiðstíð sambært
§§ 3 og 7. Henda skal tó í mest møguligan mun liggja í vanligari arbeiðstíð. Ferðing millum kl. 22.00 og 08.00 verður ikki íroknað, um handverkari fær ávíst og goldið seingjarpláss.

*Stk. 2.* Viðvíkjandi koyring verður víst til rundskriv Fíggjarmálaráðsins "Reglur um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum", dagfest tann 28. mars í 2007.

**§ 14. Flytisamsýning**
*Stk. 1.* Um kravt verður av handverkara, at hann flytur í annað stað at búgva, verða flutnings-útreiðslur hansara av húski og húsbúnaði samsýndar honum eftir rokning.

**§ 15. Arbeiðsklæði**
*Stk. 1.* Er arbeiðsbúni kravdur, rindar arbeiðsgevarin hann.

**§ 16. Fastir frídagar**
*Stk. 1.* Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagurin, hvítusunnuaftan, ½ grundlógardagurin, ½ ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur umframt allir halgidagar eru frídagar.

*Stk. 2.* Handverkarar hava harumframt rætt til frídagar eftir avtaluni um serstakar fríviku.

*Stk. 3.* Í samband við ígildiskomuna er ásett: Handverkari, sum hevur verið í starvi alt innvinningarárið, t.e. frá 1. apríl 2013 til 31. mars 2014, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2014. Hevur handverkari verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serstøku frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

**§ 17. Frítíðarreglur**
*Stk. 1.* Frítíð er eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.

*Stk. 2.* Handverkari fær 12% í frítíðarløn av goldnari yvirtíðarløn.

**§ 18. Farloyvi v.m.**
*Stk. 1.* Handverkara skal verða loyvt at fáa farloyvi uttan løn, um so er at tað ikki stríðir ímóti áhugamálum arbeiðsgevarans. Um so, at handverkari fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálum arbeiðsgevarans, skulu partarnir kunna koma ásamt um farloyvi við løn ella niðursettari løn. Farloyvi kann verða givið í upp til 2 ár hvørja ferð og í mesta lagi í 4 ár, og er tað skylda stovnsins, at starv er opið, tá ið viðkomandi kemur aftur.

**§ 19. Barnsferð**
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

*Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024:*
Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

**§ 20. Reglur fyri uppsøgn, sjúkraløn v.m.**
*Stk. 1.* Viðvíkjandi uppsagnarfreist, løn undir sjúkralegu, eftirsituløn v.m. verða reglurnar í løgtingslóg um starvsmenn at galda, tó soleiðis, at eftirsituløn verður goldin í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi handverkara, t.e. minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir. Eftirsitiløn verður eisini goldin til samlivandi. Er handverkari valdur sum álitisfólk, verður uppsagnarfreistin longd við 3 mánaðum.

*Stk. 2.* Handverkari kann fáa frí við løn, tá ið barn hansara er sjúkt, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hevur handverkari meira enn 2 børn undir 10 ár, kann hann fáa frí í upp til 20 dagar.

**§ 21. Álitisfólk**
*Stk. 1.* Tá ið tað á einum arbeiðsplássi starvast í minsta lagi 5 limir í Handverkarafeløgunum, hava hesir limir rætt at velja eitt álitisfólk. Álitisfólk og nevndarlimir kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna.

*Stk. 2.* Til álitisfólk kann bara veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á deildini í minsta lagi í 1 ár, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

*Stk. 3.* Lærlingar kunnu ikki veljast til álitisfólk.

*Stk.4.* Valið hevur ikki gildi, fyrr enn handverkarafeløgini hava góðkent tað og boðað leiðsluni á avvarðandi stovni frá. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

*Stk. 5.* Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.

*Stk. 6.* Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við leiðsluna um øll mál, sum hava týdning fyri starvsfólkið og arbeiðsplássið. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, kann tað leggja málið fyri felagið.

*Stk. 7.* Álitisfólkið skal í samráð við leiðsluna í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftunum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

**§ 22 Frí við ongari løn**
*Stk. 1.* Tá ið handverkari fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.
a) Tá ið handverkari er burtur heilar mánaðir, verða drignar heilar mánaðarlønir.
b) Tá ið handverkari er burtur vikur, dagar ella tímar, verður drigið fyri teir tímar, hann undir vanligum umstøðum hevði verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2080 (40*52). Við í árslønina verða roknað øll gjøld, sum verða goldin sum føst mánaðargjøld.

**§ 23. Seravtalur**
*Stk. 1.* Í sáttmálatíðini skal vera møguligt at gera seravtalur millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna.

**§ 24. Seravtalur fyri handverkarar/montørar í starvi hjá SEV**

***Kostskipan***
Tá handverkari frá sínum fyrisetta í seinasta lagi dagin fyri fær at vita, at møguleiki ikki verður at fara til hús til døgurða sum vanligt, eigur viðkomandi sjálvur at skaffa sær mat. Tá tað ikki er so, og handverkarar verða sendir til arbeiðis fyrrapartin soleiðis, at møguleiki ikki verður at koma aftur til hús til døgurða, og hetta er vanlig skipan, skal elfelagið SEV lata teimum døgurða (dagsins rætt).

***Burturarbeiði***
Linjumenn/montørar fáa ávíst eitt fast manningar- og uppmøtingarstað í hvørjum øki sær, og verður ferðatíðin frá hesum og út til tey ymisku arbeiðini roknað sum arbeiðstíð. Flutningur frá uppmøtingarstaði til arbeiðini kring um í økinum fer vanliga fram við arbeiðsbilum hjá SEV.
Fær linjumaður/montørur boð um (ella verður útlántur) at arbeiða uttanfyri hansara vanliga øki í avmarkað tíðarskeið, verður ferðatíðin ímillum vanliga uppmøtingarstaðið og nýggja uppmøtingarstaðið roknað sum arbeiðstíð.

**§ 25. Serstøk eykagjøld á SEV**
§ 25. Serstøk eykagjøld á SEV
Stk. 1. Fyri at arbeiða úti á spennum yvir firðir og sund verður veitt viðkomandi eitt eykagjald uppá kr. 200,- fyri hvønn dag, arbeitt verður úti á spenninum. Frá 1. januar 2024 hækkar eykagjaldið til kr. 395,-

Stk. 2. Fyri at arbeiða uppi í 60 kV mastrum verður veitt eitt eykagjald uppá kr. 10,- um tíman. Gjaldið verður uppgjørt soleiðis, at hóast arbeitt verður gjøgnum dagin partvís í mastrum og partvís á jørðini, verður gjaldið galdandi fyri allar tímarnar, arbeitt verður hvønn dagin sær. Eykagjaldið er bert galdandi fyri tey, ið luttaka í arbeiði uppi í mastrunum, t.v.s. ikki hjálparfólk niðri á jørðini, sum luttaka í sama arbeiði. 1. januar 2024 hækkar eykagjaldið til kr. 30,-

Hesi gjøld verða roknað fyri byrjaðar hálvar tímar.

Viðmerking. gjøldini verða sett í lønartalvuna, og javnaði sum vanliga lønin. Fyrstu ferð 1. januar 2025.

**§ 26. Gerðarrættur**
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

**§ 27. Gildi sáttmálans**
Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. januar í 2023 og báðir partar kunnu siga hann upp við 3 mánað freist, tó í fyrsta lagi til 1. januar í 2026.

Tórshavn tann 22.12.2023

| | |
|---|---|
| Føroya Handverkarafelag | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |
| Suni Simonsen, formaður | Jógvan Kruse, næstformaður |
| | Anita Fuglø, leiðari |
| Landsfelag Handverkaranna | |
| Danial Pauli Djurhuus, formaður | |

**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á kommunala sáttmálaøkinum**

**1. Inngangur**
Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið arbeiðspláss hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:
*Førleikamenning*
*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunala sáttmálaøkinum*
*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunala sáttmálaøkinum*
*Javnstøða*
Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá kommununum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**
Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá kommununum. Tað er tað arbeið, sum tey í kommunalari tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at arbeiðsplássini mennast.
Partarnir eru tí samdir um, at:
miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum arbeiðsplássum við høgum tænastustigi.
Hvørt arbeiðspláss/setanarmyndugleiki skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvørt arbeiðspláss at seta sær miðvís menningarmál.
Endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki arbeiðsplássins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna kommunala tænastuførleikan.
Starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá arbeiðsplássinum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk í kommunalari tænastu.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunalum arbeiðsplássum**
Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka arbeiðsplássinum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.
Tá ið arbeiðspláss evna sín eldrapolitikk, kunnu tey sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:
*Niðursett tíð*
Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast á kommunala sáttmálaøkinum seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett
Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Arbeiðsplássið kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

*Lægri starv*
Arbeiðspláss kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð á kommunala sáttmálaøkinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.
Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.
Arbeiðsplássið kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

*Niðursett tíð orsaka av sparingum*
Gera sparingar, at starvsfólk verða sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:
a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár
b. starvsfólkið hevur starvast á kommunala sáttmálaøkinum seinastu 10 árini
c. arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunalum arbeiðsplássum**
Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.
Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarnar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja kommunalt virksemi**
Um so er, at virksemi hjá kommununum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, kommunurnar hava mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á kommunalum arbeiðsplássum**

**§ 1. Inngangur**

Skulu uppgávurnar á kommunalum arbeiðsplássum verða røkt á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.

*Stk. 2.* Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá kommununum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðinum og við eftirútbúgving og víðari útbúgving. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**

Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3. Endamál**

Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4. Menningarmál**

Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum kommunalum arbeiðsplássum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka arbeiðsplássinum.

*Stk. 2.* Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.

*Stk. 3.* Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.

*Stk. 4.* Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

**§ 5. Almennur førleiki**

Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaka arbeiðsplássið og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

**§ 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd**

Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá arbeiðsplássinum og tørvinum á strategiskari førleikamenning.

Áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á arbeiðsplássunum.

Samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar.

Áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar.

*Stk. 2.* Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á arbeiðsplássinum..

*Stk. 3.* Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um arbeiðsplássið hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

**§ 7. Fylgibólkur**
Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.

**§ 8. At seta í gildi og siga upp**
Henda avtala verður sett í gildi tann 1. oktober 2014. Avtalan kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða ávaring til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1. oktober 2015.